Arbeiðseftirlitið kannar hjálmar

TÍÐINDASKRIV

Nýtir tú trygdarhjálm allastaðni har vandi er fyri at fáa nakað niður yvir teg, og er skelti á arbeiðsøki, har tað er lógarkrav at nýta trygdarhjálm?

Hesi viðurskifti fer Arbeiðseftirlitið nú at kannað

Í oktober og november fara eftirlitsfólk hjá Arbeiðseftirlitinum at vitja virkir og arbeiðspláss, sum eftir arbeiðsumhvørvislógini, skulu útvega arbeiðsfólkunum trygdarhjálm, tá arbeitt verður, eins og skelti skal vera á arbeiðsplássinum, sum upplýsir um hetta.

Arbeiðspláss og virkir, sum kunnu vænta sær vitjan av Arbeiðseftirlitinum eru:

Politikarar eru fyrimynd, tá tað snýr seg um at nýta hjálm

- Skipasmiðjur,
- lossingarpláss,
- byggipláss,
- allastaðni har arbeitt verður við krana, so sum traverskrana, lastbilkrana o.s.fr.,
- og har vandi er fyri at fáa nakað niður yvir seg ella at verða kleimdur.

Tað er eingin loyna, at tað verður heldur tilvildarliga farið um persónligu trygdina á arbeiðsplássum. Serliga torført hevur tað verið at fáa arbeiðsfólk at nýta trygdarhjálm, hóast hetta skuldi verið ein sjálvfylgja fyri einstaklingin, í royndini at verja seg móti arbeiðsóhappum.

Arbeiðseftirlitið veit um arbeiðsóhapp, har fólk hava bjargað lívinum, tí trygdarhjálmur varð nýttur. Kortini veit Arbeiðseftirlitið eisini, at fólk hava ilt við at góðtaka trygdarhjálmin, tí hesin skal vera ein bági í arbeiðinum.

Eftirlitsfólkini fara at vitja virkir og arbeiðsøki kring landið at kanna, um trygdarhjálmar verða nýttir, har tað er krav.

Har trygdarskelti eru sett upp og trygdarhjálmar eru útvegaðir og nýttir, hendir einki.

Er einki skelti á arbeiðsøkinum, og verða trygdarhjálmar ikki nýttir, verður frágreiðing skrivað og send fútanum, sum tekur støðu til at reisa ákæru móti arbeiðsgevaranum, og hann kann vænta sær bót, sum fútin ásetur við sektaruppskoti. Verður bótin ikki goldin, endar málið í rættinum.

Hugsast kann eisini, at arbeiðsgevarin hevur sett skelti upp og útvegað trygdarhjálmar, sum kortini ikki verða nýttir, og tá kann arbeiðarin eisini verða ákærdur, um hann ikki aktar givin boð.

Karl Joensen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum sigur, at tiltakið við trygdarhjálminum er bert ein byrjan í royndini at fáa fólk at akta boðunum um persónliga trygdarútgerð. Ætlanin er, at næsta átak skal snúgva seg um at kanna, hvussu stendur til við trygdini, tá tað snýr seg um at nýta fallsikring og byggipallar.

Í 1992 gjørdi Arbeiðseftirlitið eina líknandi kanning og tá blivu 50 ymisk virkir og arbeiðspláss vitja. Av teimu, blivu 20 ákærd og fingu bót. Bótin tá var millum 1.000 og 1.500 kr. til stjórar og arbeiðsleiðarar.



Økingin langt frá nóg mikið

– Vit kasta ikki frá okkum tað sum vit fáa afturat, men økingin í játtanini til fólkaskúlan komandi ár er langt frá nóg mikið, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag

Mynd: Jens Kristian Vang

– Økingin í játtanini til fólkaskúlan komandi ár er ein byrjan, men hon er langt frá nóg mikið til at fáa fólkaskúlan uppá eitt nøktandi støði. Nógv tann størsti parturin fer til lógarásettar bindingar, og lítið er eftir til sjálvan fólkaskúlan, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag

FÓLKASKÚLIN

Turið Kjølbro

Økingin í játtanini til fólkaskúlan komandi ár í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg, er tann størsta í nógv ár. Umframt lønarhækkingarnar er talan um eina meirjáttan á umleið 14 mió. krónur, har økt sernámsfrøðiligt virksemi er íroknað. Meginparturin av økingini í játtanini fer til útreiðslur sum eftirlønn, starvsaldurbroytingar, meirútreiðslur sambært semju millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Í alt umleið 6-7 mió. krónur. Restin fer til at hækka støðið í fólkaskúlanum við í mun til í ár, verður sagt.

– Í grundini fer nógv tann størsti parturin til lógarásettar bindingar. Lítið er eftir til sjálvan fólkaskúlan. KT-vørðar eitt nú er eitt dýrt øki, hetta er ikki komið í gongd enn, freistin er 1. januar og hesum er als ikki tikið hædd fyri í komandi fíggjarlóg, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

– Táið vit hyggja at øðrum økjum, sum eisini tørvar pengar, kunnu vit ikki væntа, at játtanin til fólkaskúlan økist uppá støðið hon eigur at vera. Økingin er ein byrjan, men hon er langt frá nóg mikið til at fáa fólkaskúlan uppá eitt nøktandi støði. Serliga táið vit hugsa um, at vit hava eina nýggja fólkaskúlalóg, sum krevur ein øðrvísi skipaðan skúla.

– Sparifrymilin er ikki broyttur, og hóast sagt verður, at hann verður endurskoðaður, er tað arbeiðið als ikki komið nakran veg. Og sparifrymilin er millum størstu meinbogar í dagsins fólkaskúla. Verður hann endurskoðaður soleiðis, at atlit verða tikin til stórar og smærri skúlar, er komið væl áleiðis. Frymilin er gjørdur fyri at spara, so hann er í grundini órættvísur fyri allar skúlar.

Øðrvísi tímabýti

Eftir fund við landsstýrismannin í undirvísingarmálum hevur Føroya Lærarafelag fingið eina vón um, at tímarnir til skúlarnar verða lutaðir øðrvísi út enn teir verða í dag.

– Verða tímarnir býttir lutvíst uppá næmingar og lutvíst uppá flokkar, merkir tað, at smærri flokkar og skúlar við samansettum flokkum verða betur fyri enn teir eru í dag. Er landsstýrismaðurin fúsur at gera hesa broytingina, er tað bara gleðiligt, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Í almannaverkinum eru nógvar uppgávur og skyldur lógarkravdar og harvið bundnar til eina nøktandi játtan. Á sama hátt eigur skúlaverkið at verða skipað, heldur Føroya Lærarafelag, men Mentamálastýrið er ikki samt.

– Ásetingarnar í fólkaskúlalógini eru rættiliga yvirornaðar og undantøkini eru nógv. Mentamálastýrið ber seg undan við at vísa til øll undantøkini í lógini, sum jú ikki eru krøv, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Ein dropi

Sernámsfrøðiligt virksemi hevur altíð havt trong kor í Føroyum, og hóast játtanin til hetta virksemið økist við tveimum mió. krónum komandi ár, er langt frá nóg mikið. Fyri at veita teimum næmingum, sum hava tørv á serligum stuðli í skúlanum, eina tænastu, sum liggur innan fyri lágmarkið, metti Mentamálastýrið í uppleggjinum til fíggjarlógina, at neyðugt verð at økja játtanina við 5 mió. krónum. Tær tvær mió. krónurnar, sum eftir øllum at døma koma afturat, røkka til umleið 200 tímar aftur. Sum er er tørvurin umleið 2500 tímar og við økingini komandi ár verður umleið helmingurin av tørvinum nøktaður.

– Sjálvandi er at fegnast um, at játtanin verður økt, men vit fáa ikki arbeitt bert við eitt sindur meiri. Tað bara útsetir pínuna, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Lógvatak

Hóast Føroya Lærarafelag ikki metir, at økingin í játtanini til fólkaskúlan er nóg mikið, heldur forkvinnan í felagnum, at tey og landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum so ella so tosa sama mál.

– Í mun til aðrar landsstýrismenn í undirvísingarmálum, veit hesin, hvat tað vil siga, at hava ábyrgdina av einum skúla og ongar pengar at hava. Tað hevur eydnast honum at útvega fólkaskúlanum eina størri játtan. Men Føroya Lærarafelag, fjølmiðlarnir og andstøðan eiga eisini ein part av æruni, tí øll hesi hava ikki helmað í við at víst á trupulleikar. Eg ivist tó í, at fatanin fyri fólkaskúlanum í landsstýrinum er so nógv størri enn hon hevur verið. Landsstýrið hevur ikki nakað val enn at økja játtanina, og vit skulu eisini minnast til, at tað er stutt til val.

– Hevði Føroya Lærarafelag fingið stuðul frá foreldrum, hevði nógv kunnað verið gjørt fyri at bøta um tann føroyska fólkaskúlan. Í felag kundu vit útvegað fólkaskúlanum tær umstøður, sum liggja í pappírinum. Føroysk foreldur hava ikki tradisjón fyri at blanda seg uppí skúlaviðurskifti, men tíðin er búgvin at gera nakað nú, sigur Elsa Birgitta P. Petersen at enda í viðtali.

Tøkk

Vit takka øllum so hjartaliga fyri heiðurin, ið okkum varð sýndur, tá ið vit hildu gullbrúdleyp okkara t. 8. september 2001.

Tøkk til Sørvágs Hornorkestur, sum tóku okkum á bóli og spældi fyri okkum á morgunstundini. Tøkk fyri uppsetan av flaggstong við veittrandi Merki inni á økinum hjá okkum, og ikki at gloyma heiðursgrindina, sum tit settu upp. Annars tøkk til tykkum, sum vundu fløgg á stong, sum sendu blómur og fjarrit, og sum ringdu til okkum.

Tøkk til familju og gestir, sum luttóku í veitsluni við sangi og frálíkum røðum. Takk fyri gávur! Takk til Jørgen og Jákup fyri tykkara frálíka spæl og sang til dansin.

Takk til kokkarnar fyri tykkara frálíka avrik!

At enda gongur tøkkin til okkara kæru børn og svigarbørn fyri tykkara stóra fyrireikingararbeiði!

Væl veri tykkum øllum!

Blíðar heilsanir,
Mary & Tóri Skaalum
380 Sørvágur